# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Tordis Mohr, Tórshavn:

## 25 ára starvsdag hjá Postverkinum



*Mynd: Roymer Lamhauge*

2. apríl 2004 hevði Tordis Mohr í Havn 25 ára starvsdag hjá Postverki Føroya.

Tordis byrjaði á Posthúsinum í miðbýunum og arbeiddi har tey fyrstu trý árini. Síðan hevur hon arbeitt á Girostovuni, sum í nógv ár hevur hildið til á Argjum og nú er flutt inn á høvuðsposthúsið á Óðinshædd.

Tordis er dóttir Maritu, f. Pálsdóttir Hansen, og Hera Mohr í Havn. Hon er gift við Arna Gunnarsson í Havn. Børnini eru: Rúni, Bjarni, Heini og Ingibjørg.

Jákup H. Lützen, Tórshavn:

## Ungur violinspælari í góðum felagsskapi

**Í vikuskiftinum 3.-4. apríl 2004 luttók 15 ára gamli Jákup H. Lützen í Havn, sum tann einasti føroyski luttakarin, í eini spennandi og nýskapandi Master Class og eini konsert á Ráðhúsinum í Reykjavík**



Orsøkin til ferðina var kappingin "Kamartónlist til framtíðar", sum íslendska KaSa-tónlistabólkurin í vetur útskrivaði við tí endamáli at geva ungum musikktalentum úr Føroyum og Grønlandi eina heilt serliga uppliving.

Millum luttakararnar blivu Jákup H. Lützen og tveir íslendingar valdir út. Virðislønin var eitt vikuskifti í Reykjavík, har alt var goldið, og teir tríggir vinnararnir spældu saman við teimum professionellu tónleikarunum frá KaSa-tónlistabólkinum.

Jákup hevur spælt violin síðan hann var 5 ára gamal og er næmingur hjá Anette Nielsen í Tórshavnar Musikkskúla. Hann gongur í 9. flokki í Tórshavnar Kommunuskúla og er yngsti violinspælari í Føroya Symfoniorkestri.

Jákup er sonur Dagny Højgaard og Herluf Lützen í Havn.




MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost:
**post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til:
**Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn**
**merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800**

Sosialurin


Robert Mortensen, Tórshavn:

## 25 ára starvsdag hjá Postverki Føroya



*Mynd: Roymer Lamhauge*

1. apríl 2004 hevði Robert Mortensen í Havn 25 ára starvsdag hjá Postverki Føroya.

Robert er 45 ára gamal og sørvingur. Hann byrjaði á Frímerkjadeildini 1. apríl 1979, og í sínum arbeiði kom hann at gera onkrar uppgávur fyri Girostovuna. Hetta var um tað tíðina, tá stovnurin byrjaði at brúka EDV, og hann fekk beinanvegin stóran áhuga í hesi nýggju tøknini.

Hann bleiv sendur til Danmarkar at læra at programmera, og síðan 1986 hevur hann arbeitt sum EDV-maður burturav. Hann er ein sannur teldusnillingur, og hevur hann verið við til at bygt teldukervið hjá Postverkinum upp frá byrjan.

Umframt at hann tók handilsskúlaprógv sum ungur, hevur hann eisini tikið datanomútbúgving á Føroya Handilsskúla.

Robert er sonur Mary, f. Langgaard, ættað úr Leirvík, og Hans Mortensen í Sørvági.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Jógvan Jákup Jacobsen:

## 25 ára starvsdag hjá Landsverkfrøðinginum



Jógvan Jákup Jacobsen byrjaði at arbeiða hjá Landsverkfrøðinginum 2. apríl 1979.

Sama summarið var hann við at gera tunnulin til Mikladals í Kalsoynni.

1982-1985: Jógvan Jákup arbeiddi í Leirvíkartunlinum. Harumframt var hann í Noregi í eitt 5-mánaðar tíðarskeið í sambandi við tunnilsarbeiði. Tá ið tunnilin til Trøllanes var gjørdur, var Jógvan Jákup við í tí, og tá ið fast samband var gjørt um Haraldssund, og vegurin til Kunoyar var gjørdur liðugur, taldist hann somuleiðis millum arbeiðsfólkið har. Hesa tíðina vóru eisini fleiri møtipláss longd og breiðkað inni í Boroyðartunnlinum. Seinni var hann aftur eitt tíðarskeið í Noregi í sambandi við undirsjóvartunnilsarbeiði.

1989: Byrjað var uppá fyrireikingarnar til undirsjóvartunnilin undir Vestmannasund, og nú hevði Jógvan Jákup sjálvsagt royndir frá líknandi arbeiði í Noregi. Skúrar vórðu settir upp og arbeiðsplássið gjørt til, men veruliga arbeiði uppá tunnilin fór ikki í gongd fyrr enn eini 10 ár seinni.

1991-1992: Jógvan Jákup var við til at breiðka vegin millum Hósvík og Maskinmiðstøðina. Í sama tíðarskeiði var hann í Íslandi í sambandi við el-verk í tunnli.

1992-1999: Í hesum tíðarskeiði var Jógvan Jákup arbeiðsformaður í Sumbiartunlinum. Hetta tók fleiri ár og var í teimum ringu tíðunum í Føroyum, og var tí lítil játtan sett av til hesa verkætlan.

1999: Jógvan var við til at gera goymslutunlarnar fyri Fuglafjarðar kommunu. Síðani var hann eisini formaður fyri arbeiði við Gásadalstunnilin. Seinasta verkætlan Jógvan Jákup hevur verið við í, var at breiðka vegin á Oyrarbakka. Ikki kann sigast annað, enn at talan er um ein mann við drúgvum royndum, serliga innan tunnilsarbeiði. Hann hevur bæði arbeitt í Føroyum, Noregi og Íslandi.

Í dag er Jógvan Jákup formaður á Skervverkinum hjá Landsverkfrøðinginum á Hústoft.

Vit vilja ynskja honum hjartaliga tillukku við 25 ára starvsdegnum og 50 ára føðingardegnum 11 apríl. Nú um dagarnar eru Elsa og Jógvan Jákup í páskafrí í Íslandi

**Árni**

# Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálp, tá ið kæri maður, pápi, verfaðir, abbi og bróður okkara

**Edvin Strøm**
Vágur

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til starvsfólkið á B8, prestarnar Hera Joensen og Patrick de Neergaard, Meinigheitshúsið í Vági, kirkjutænarar, sangarar og tykkum øll sum hjálptu okkum so væl til jarðarferðina.

Takk fyri gávur til kirkjuna, blómur og heilsanir.
Tøkk til øll sum fylgdu Edvini
úr landssjúkrahúskapellinum og úr kirkjuni
til hansara seinasta hvíldarstað.
Gleðiligar páskir.

**Helena**
**Susie, Arthur, Jón, Mary-Ann, Carol og Malan**

## Dagurin

**7. apríl. Egesippus**, deyður umleið ár 180. Jødi í Róm, sum gjørdist kristin.

Dagbjørg Hjaltalin og Ólavur Groth:

## Veitsla fyri støk

**Væl umtókta veitslan fyri støk, sum var í Havn 21. februar í ár, verður nú tikin upp aftur 22. mai í Pálsstovu. Tað eru tey bæði Dagbjørg Hjaltalin og Ólavur Groth ið enn einaferð skipa fyri einari veitslu**



*Ólavur Groth og Dagbjørg Hjaltalin skipa fyri veitslu fyri støk 22. mai*

Veitslan fyri støk sum var 21. februar 2004 eydnaðist so væl at tey bæði Dagbjørg Hjaltalin og Ólavur Groth nú aftur skipa fyri eini veitslu, sum verður 22. mai.

Seinast vóru gott 200 fólk, og dansað bleiv til "den lyse morgen", og fólk vóru sum heild væl nøgd. Av tí at Hølini vóru minni enn væntað, so tað gjørdist ov drúgv tíð, áðrenn øll høvdu fingið at eta. Hetta hava tey sjálvandi hugsa nógv um, so tað ikki kemur fyri aftur. So tey hava skift høli, so nú verður meira pláss og umstøðurnar betri, siga tey bæði.

Tá vit spyrja, hvat orsøkin er, til at tey skipa fyri einari veitslu afturat, siga tey, at tað vísir seg at vera tørvur á slíkum tiltaki. Tað eru fleiri, ið hava heitt á tey um at skipa fyri enn einari veitslu.

Tey venda sær til støk, sum eru 35 ár og eldri. Á veitsluni verður orkestur við góðum dansitónleiki - mest sokallaðum 60-ara tónleiki.

Pláss er fyri umleið 200 fólk um. Tey fyrstu 150 eru tryggja tilmeldan. Um so verður, at munur er á tilmeldandi imillum kynini, verða tær seinastu 50 tilmeldanir góðkendar eftir kynsbýti, grunda á at fáa ein góðan dans.

Longu nú kunnu tey, ið vilja tryggja sær pláss, rinda peningin til konto nr. 407.410.7. í Suðuroyar Sparikassa. Minnast skal til at kvittanin verður nýtt sum atgongumerki og setast skal navn, bústað og telefonnummar á.

Tiltakið verður lýst í Sosialinum 1. mai 2004. Veitslan kostar 350 krónur. Fyri tað fáa tey góðan mat, undirhald við borði og dansitónleik.

Sum sagt var í Mentunarsendingini hjá Sjónvarpinum, so fara tey støku ikki so ofta út at eta. Tí halda vit at tað er umráðandi at maturin er góður, tí hava vit ein væl útbúnan kokk til at standa fyri tí partinum, siga Dagbjørg og Ólavur.

Veitslan verður í Havn . Tey eru so heppin, at tey hava fingið Pálsstovu, sum liggur í Mykinesgøtu 7.

Pállstova er sera væl egna til hetta tiltak. Har er rúmligt.

Um ikki roykjarar ynskja tað, kunnu tey velja at sita saman undir borðhaldinum, men so skal tað viðmerkjast á kvittani "ikki roykjari"

Aftaná borðhaldið er eisini ein stova, har ikki má roykjast.

Tá vit spyrja, um tað eru tey, sum skipa fyri eini slíkari veitsluni á Toftum fyri støk, siga tey, at tey kenna einki til tað tiltaki og vita heldur ikki hvør stendur fyri tí.

Um áhugi er fyri tí, verður hetta eitt afturvendandi tiltak einar 3 ferðir um árið.

Tey sum vilja vita meira um veitsluna kunnu ringja til Dagbjørg tlf. 258833 ella Ólavur tlf. 220589, best eftir kl 16.00.



## Valborg Jacobsen 60 ár

Skírishósdag 8. apríl verður móðir okkara, Valborg Jacobsen úr Syðrugøtu 60 ár.

Vit vilja við hesum takka tær fyri alt tú ert fyri okkum.
Tú skapar gleði og ljós um teg allastaðni har tú ert.
Vit gleðast um at kunna fagna tær á tínum 60 ára degi.
Takk at tú lærir okkum um lívið,
takk at tú vísir okkum á ljósið
*takk Gud at hon gjørdist móðir okkara.*

Dagurin verður hildin hjá soninum Jens Klæmint í Norðragøtu.